

*Umboð fyri føroyskar stovnar, sum hava eitthvørt tilknýti til eina komandi oljuboring hittast á Hafnia*

# Startskot til oljuboring

**Umboð fyri føroyskar myndugleikar og oljufelagið Statoil, sum stendur fyri boring í summar hittust á fundi í farnu viku at viðgera komandi boring**



*Millum umboðini fólk frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og flogvøllinum í Vágum*

OLJUBORING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Nú eru minni enn fimm mánaðir til fyrstu boringina á basaltinum inni á føroyska landgrunninum. Í hesum sambandi var startskot latið av í Havn í vikuni, tá umboð fyri nógvar stovnar og fyritstøðufelagið Statoil møttust. Talan var um ein sokallaðan "Kickof" fund, har sett verður út í kortið

Í sambandi við eina boring sum hesa verða mong krøv sett til bæði fyristøðufelagið og ymsu myndugleikarnar, sum hava eitthvørt tilknýti til boringina eitt nú viðvíkjandi umhvørvi, heilsu og trygd osfr. Fyristøðufelagið skal lata lata inn eina umsòkn, har hesi mongu krøv eru eftirlíkað. Nógvir føroyskir myndugleikar eru partur av hesi tilgongdini og fyri at alt kann vera uppá pláss hjá Statoil skal felagið í seinasta lagið tríggjar mánaðir undan sjálvari boringini lata inn umsókn.

Millum stovnarnar, sum vóru við á fundinum hósdagin, vóru Jarðfeingi (tað er nýggja navnið á Oljufyrisitingini, blaðm.), løgreglan, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sjúkrahús, landslækni, arbeiðseftirlit, apoteksverk, flogvøllur o.o. Eisini vóru umboð fyri borifelagið Stena við á fundinum.

Rúni Hansen, stjóri í Statoil sigur, at talan var um ein kunnandi fund, har teir ymsu partarnir løgdu fram ymsu krøvini og ynskini til ta komandi boringina. Hjá Statoil hava tey úr at gera í hesum døgum og fer virksemi at økjast sohvørt, eitt nú tá tilboð til sáttmálar skulu út.

Miðjað verður ímóti at seta borin í undirgrundina í juli.



*Oddafólk frá Stena borifelagnum vórðu eisini við*

# Íslendingar brúka Føroyar sum fyrimynd



*Íslendingar og føroyingar á skúlabonki í Jarðfeingi (fyrr. Oljufyrisitingini, blaðm.)*

**Umboð fyri íslendskar orkumyndugleikar væl nøgd við kunning um føroyska oljutilgongd**

ORKUMÁL
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Herfyri vóru fimm umboð fyri íslendskar orkumyndugleikar í Føroyum fyri at kunna seg um føroysku oljutilgongdina her serstakliga um, hvussu vit hava skipað loyvisumførini, og hvussu vit annars hava skipað okkum á teimum ymsu umráðunum, sum hava tilknýti til oljuleiting.

Í hesum sambandi varð seminar hildið fyri íslendsku gestunum, har umboð fyri nøgvar ymsar tættir innan vinnu og almennar stovnar hildu fyrilestur. – Hetta var eitt sera væleydnað tiltak og vórðu íslendingar einki minni enn ovfarnir av, hvussu væl tað hevur verið skipað fyri í allari okkara oljutilgongd sigur Súsanna Sørensen, tíðindastjóri hjá Jarðfeingi (fyrr Oljufyrisitingini, blaðm.) Hon sigur, at íslendingarnir, sum sjálvir eru í ferð við at fyrireika fyrstu leitirunduna, róstu teimum mongu fólkunum, sum hava lagt lunnar undir føroysku oljutilgongdini tað veri seg í lógarsmíði og øðrum tættum í tilgongdini.

Súsanna Sørensen leggur aftrat, at eisini tey og umboð fyri ymsar føroyskar myndugleikar fingu nógv burtur úr teimum báðum døgunum tey vóru saman. – Vit fingu eitt sera gott og neyvt innlit í íslendska orkulóggávu og annars orkustøðu og orkutilgongd í íslendska samfelagnum sum heild. Heríllum liberaliseringini, sum er farin fram har. Henda vitan hevur nógv at siga fyri okkum, sum eru í ferð við at gera eitt nú eina elveitingarlóggávu. Súsanna Sørensen sigur, at íslendska vitjanin hevur verið bæði íslendingum og okkum sjálvum til stórt gagn.



*Nógv kom burtur úr felags kunningini um føroysku oljutilgongdina og íslendsku orkustøðuna*